Tórshavn 14. nov. 2025

Hoyringssvar til

”Løgtingslóg Um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (Fyrireiking, prosjektering og útboð)”

Sum borgari í hesum landi loyvi eg mær hervið at koma við nøkrum viðmerkingum til ætlanirnar hjá Føroya Landsstýri um Suðuroyartunnilin.

Lógaruppskotið snýr seg um, hvør linjuføring er besta loysnin fyri ætlaða tunnilin. Í mínum høvdið vendir hetta púra skeivt. Heldur enn at tosa um linjuføring, átti Føroya Løgting at gjørt neyðuga arbeiði at kanna til fulnar, um Føroya land hevur ráð til yvirhøvur at hugsa um at gera ein suðuroyartunnil.

Suðuroyggin hevur altíð verið mest fjarskotna størra oyggin í Føroyum í mun til meginøkið. Av somu orsøk hevur altíð verið raðfest eitt gott, tíðarhóskandi ferðasamband millum Suðuroy og Havnina – fyrst av framskygdum vinnulívsfólki og seinni av Føroya Landsstýri.

Tí er einki at siga til, at suðringar eisini vilja hava fast samband við meginøkið, eins og allar aðrar størri oyggjar hava fingið seinastu 20-25 árini. Tað er heldur eingin ivi um, at føroyingar flest unna suðringum fast samband – hóast nógv eisini eru glað fyri sjóvegis sambandið við Smyrli.

Hinvegin er heldur eingin ivi um, at sera nógvir føroyingar eru ógvuliga ivasamir, um stundin er tann rætta at fara undir eina so stóra og kostnaðarmikla verkætlan her og nú. Búskaparliga er hetta so nógv, nógv tann størsta íløgan, sum nakrantíð er gjørd í Føroyum, og samstundis er óvissan – bæði tøkniliga og ikki minni fíggjarliga – sera stór. Øll óvissan er búskaparliga beinleiðis knýtt í føroyska landskassan, sum tískil kan enda við at standa við eini rættuliga nógv størri rokning enn frammanundan mett. Ikki er neyðugt at koma við dømum frá líknandi støðum her, tí tey eru nógv og kend av øllum. Munurin er bara tann, at dømini higartil ikki hava verið nær námind so kostnaðarmikil sum ætlaði suðuroyartunnilin.

Eingin orsøk er at halda, at henda verkætlanin ikki verður rakt av tí sama, og tað kann eftir mínum tykki fáa nakrar ómetaligar óhepnar avleiðingar fyri Føroya land og framtíðina hjá føroyska fólkinum.

Føroyski landskassin stendur eftir við endaligu rokningini – so ella so – og neyðugt verður tí at taka upp stór uttanlandslán at fíggja hetta. Hesi lán skulu gjaldast aftur við peningi úr landskassanum, sum longu í dag ikki klárar at svara hvørjum sítt uttan lántøku. Hetta í bestu tíðum. Ilt er at spáa um framtíðina, men at búskaparligi vøksturin í Føroyum verður nógv størri komandi nógvu árini eru ikki nógv tekin í sól og mána um. Harumframt kemur nógv umrødda haldførisavbjóðingin, sum eisini fer at økja um framtíðarkostnaðin at reka føroyska samfelagið.

Uttanlandsskuldin skal gjaldast aftur eftir ásettu treytunum hjá lánveitaranum, og tað sum eftir er skal so brúkast til rakstrar- og íløgutørvin hjá føroyska samfelagnum. Við einum avmarkaðum búskaparvøkstri og øktum rakstrar- og íløgutørvi annars, er eygsæð at neyðugt verður í framtíðini at skerja munandi um nakrar av útreiðslunum hjá landskassanum. Við øðrum orðum at skerja vælferðina.

Hvørjar avleiðingar ein munandi skerjing av vælferðini kann hava á føroyska samfelagið, sóu vit í 90’unum, tá fólk í hópatali fluttu av landinum, tí tey ikki fingu endarnar at røkka saman. Tann støðan

kann lættliga endurtaka seg, um farið verður undir suðuroyartunnilin uttan at gera neyðugu váðametingina og neyðugu tillagingarnar av framtíðar føroyska búskapinum.

Tí eigur Føroya Løgting - áðrenn nøkur verkætlan um suðuroyartunnil verður sett í gongd – at krevja at gjørdar verða metingar av rakstrar- og íløgutørvinum hjá føroyska samfelagnum komandi nógvu árini, herundir at seta upphædd og konto á neyðugu skerjingarnar undir givnum fyritreytum. Hesar metingar eiga at røkka minst 15-20 ár fram, um tað skal geva nakra meining.

Tá kann støða takast til suðuroyartunnilin á upplýstum grundarlagi, og ikki sum nú, har ein situr við kensluni av, at tað bara er ein avgreiðsluspurningur, tí eingin torir at tala ímóti at fara undir tunnilin beinan vegin – kosta hvat í kosta vil. Hetta er ikki við til at byggja álit á landsins kosnu.

Verkætlanin um suðuroyartunnil er so mikið stór og váðafull, at hátturin sum verkætlanin higartil er handfarin eftir skapar alt annað enn álit. Tað er ein háðan móti Føroya fólki – bæði okkum sum búgva her í dag, men ikki minni móti komandi ættarliðunum sum skulu gerast framtíðar skattgjaldarar í Føroyum og sum í síðsta enda koma at hanga uppá rokningina. Avleiðingina av tí kenna vit ikki – men tað krevur neyvan tað stóra hugflogið at ímynda sær, hvørjar tær kunnu gerast.

Hvør nytta er tá í einum suðuroyartunnli?

Helgi Nielsen